# Bilar og undirhald í ítróttarhøllini á Tvøroyri

**Um vikuskiftið verður stórt tiltak í ítróttarhøllini á Tvøroyri við Bilaframsýning, hoppiborg og tombola**

FRAMSÝNING OG UNDIRHALD

*Áki Bertholdsen*

Hetta vikuskiftíð verður stórt tiltak í tróttarhøllini á Tvøroyri. Tað eru gamlaársnevndin á Tvøroyri sum hevur stóra bilaframsýning í høllini. Samstundis fer Lions Klubburin í Suðuroy at hava ymiskt undirhald.

Bilaframsýningin verður opin í kvøld frá kl. 17 til 22. Í morgin og sunnudagin er opið frá klokkan 14 til 20.

Tær bilasølur, sum eru við á stevnuni, eru Wenzel Petersen við Ford bilum, Bilasølan hjá Øssur Johannesen, ið hevur VW og Audi, Berg Motor, ið hevur Mazda, Eyðbjørn Hansen, ið hevur Suzuki, Esmar Simonsen, sum umboðar Daewoo, Bilfríðkan, ið selur BMW og Fiat, umframt Nordbil, sum selur Honda, Skoda og Hyundai.

Harumframt fer Alval at vísa fram sergjørd arbeiðsklæðir av ymsum slag.



*Ítróttarhøllin í Trongisvági verður miðdepilin um stórt tiltak hetta vikuskiftið. Har verður stór bilaframýning og ymiskt undirhald*

### Hoppiborg og tombola

Ímeðan framsýningin er opin leygardagin og sunnudagin, báðar dagarnar frá kl. 14-20, fer Lions Klubburin at hava ymiskt undirhald í høllini. Har verður eitt nú stórt tombolola, har vinningarnir eru kakur og matur, tey fara at ísar og popkorn og ikki minst verður ein hoppiborg til børnini. Allur peningurin, sum Lions fer inn, fer til ymisk vælgerðandi endamál. Peningurin, sum gamlaársnevndin fær inn av bilaframsýningini, fer til nýggjárshaldið á Tvøroyri.




## Forlagið Sprotin rimmar sølutiltak í SMS

**Tíðindaskriv**

Fríggja- og leygardagin hevur Forlagið Sprotin forkunnugt og spennandi sølutiltak á Torginum í SMS.

Forlagið Sprotin hevur givið íalt umleið 70 bøkur út, síðan tað var stovnað í 1993. Hesar útgávur eru allar góðar bókur, sum forlagið kanska hevur gjørt ov lítið burturúr.Við átakinum á Torginum í SMS fríggjadagin og leygardagin vil Sprotin vísa á mongu útgávur forlagsins, sum eru verdar at lesa, men sum tíverri ov fá vita um.

Hesar báðar dagarnar kunnu vitjandi á Torginum í SMS ogna sær flestu av hesum íalt 70 útgávum felagsins fyri spottprísir. Eitt nú verða allar bøkur eldri enn 3 ár seldar fyri 48,- og t.d. verður nógv umrødda myndlistabókin eftir Bárð Jákupsson seld fyri einans 280,-

Fyri tveimum árum síðan setti forlagið á stovn ein bókaklubba, sum hevði til endamáls, at geva út í bók nógvar av teimum týðingum, sum millum ár og dag eru gjørdar, men ongantíð komnar longur enn til handrit. Av hesum tilfari hevur forlagið givið eini 20 skaldsøgur út. Hesar skaldsøgur eru ein blandingur av klassikarum og nýggjum skaldsøgum. Og hesar bøkur verða seldar við 25% í avsláttri hesar báðar dagarn forlagið heldur til á Torginum. Til ber eisini hjá áhugaðum at tekna seg um lim í bókaklubba Sprotans, og binda seg at keypa 4 bøkur árliga. Teknar tú sum lim í bókaklubba Sprotans fríggja- ella leygardagin í SMS, kanst tú velja tær eina bók fyri einans 10,-

Nevnast kann eisini, at skúlar, sum keypa flokssett av skaldsøgum ella t. d. søgubøkurnar hjá Hans Jakku Debes, mállæruna eftir Jeffrei Henriksen ella litprydda sagnasavnið »Fram við strendur« fáa bøkurnar fyri helvtarprís.

Eisini er vert at leggja til merkis, at um tú keypir fleiri enn 10 bøkur - sum kanska fleiri gera, nú jólini nærkast, og jólagávurnar skulu keypast - fáa allar tíggju bøkurnar fyri helvtarprís.



# Fer at kosta fleiri hundrað milliónir í mistum inntøkum

**– Heldur enn at leggjast á ALS, brutu hundraðtals føroyskir handverkarar upp um armar í kreppuárunum og fóru uttanlands at arbeiða. Teir hava vunnið føroyska samfelagnum milliónir í inntøkum. Nú fer alt fyri skeytið, sigur byggileiðarin í CN Bygg**

UTTANLANDSFRÁDRÁTTUR

*Áki Bertholdsen*



*– Við at skerja uttanlandsfrádráttin, ætlar Karsten Hansen at tvinga einar 300 føroyskar handverkararnir sum arbeiða uttanlands, heim at arbeiða. Men so skulu vit útvega teimum hálvtannað hús at smíða um árið í part og tað er ómøguligt, sigur byggileiðarin hjá CN Bygg* *(savnsmynd)*

– Fær Karsten Hansen sín vilja, fara kanska fleiri hundrað mans at rýma av landinum og samstundis fer føroyska samfelagið at missa milliónir í inntøkum um árið.

Reinhold Nielsen, byggileiðari hjá føroyska byggifelagnum CN Bygg, sigur, at tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar, um uttanlandsfrádrátturin hjá handverkarum nú verður skerdur niður í 100 krónur um dagin, soleiðis sum Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur gjørt av.

– At Karsten Hansen ger hetta, vísir, hvussu lítið hann, og møguliga nøkur heilt fá onnur, hava skilt av støðuni.

### Fullu ikki í fátt

Reinhold Nielsen sigur, at tá ið kreppan rakti landið sum eitt óløgið og nógvir handverkarar mistu arbeiði, vóru tað ikki øll, sum góvu skarvin yvir og løgdust á ALS.

– Tvørturímóti vóru tað hundraðtals føroyskir handverkarar, sum brutu upp um armar og fóru uttanlands at arbeiða.

Vit vóru nógvir, sum noyddust at búleikast uttanlands tað mesta av nítiárunum.

– Tí hava vit ein heilt annan kunnleika til málið, enn landsstýrismaðurin hevur og tískil hava vit eisini eina heilt aðra uppfatan av støðuni, enn hann, sigur Reinhold Nielsen.

Hann sigur, at uttan hjálp frá nøkrum, hava hesir handverkarar upparbeitt ein marknað fyri føroyskum handverkjarum, m.a. í Danmark.

– Føroyskir hondverkarar uttanlands hava úr at gera og hesi árini hava teir vunnið føroyska samfelagnum hundraðtals milliónir í inntøkum, skatti og avgjøldum, umframt at lønin er sett í umfar í Føroyska samfelagnum.

Samstundis hava teir spart ALS nógvar, nógvar milliónir og harafturat skapti tað rúm fyri, at teir handverkarar, sum vóru eftir, fingu so frægt at gera í part, at teir hóraðu undan.

– Sostatt hava hesir handverkarar verið ein munandi inntøkukelda hjá føroyska samfelagnum.

– At vit fóru uttanlands var sostatt at gera føroyska samfelagnum eina stóra tænastu í teimum ringu tíðini, tí fóru vit ikki, var onki eftir av ALS. At vit fóru gjørdu samstundis, at teir, sum eftir vóru, hóast alt fingu okkurt at gera.

Byggileiðarin í CN Bygg sigur, at bæði Karsten Hansen og summi onnur, hava fullkomiliga misskilt uttanlandsfrádráttur, sum hesir handverkarar hava fingið.

– Talan er ikki um ein skattalætta. Talan er um eitt lítið endurgjald, fyri ferðaútreiðslur og vistarhald, sum hesir menn hava fingið fyri at fara uttanlands at søkja sær arbeiði, heldur enn at leggjast á ALS í Føroyum, akkurat sum so nógv onnur, eitt nú fólk í almennum starvi, fáa, tá ið tey fara uttanlands í arbeiðsørindum.

### Rýma av landinum

Nú landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur gjørt av at lækka uttanlandsfrádráttin niður í 100 krónur, sigur hann, at hann er sannførdur um, at ongin fer at rýma av landinum av hesi orsøk.

– Eg kann vissa landsstýrismannin um, at her fer hann skeivur, sigur Reinhold Nielsen.

Hann sigur, at hann hevur tosað við nógvar handverkarar, og teir eru so at siga á einum máli um, at teir flyta av landinum, um uttanlandsfrádrátturin verður skerdur.

– Størri parturin av føroysku handverkarunum uttanlands eru eru leysir kroppar og tað er tí onki hóvasták av at flyta.

– Tað er nógvir fyrimunir við at flyta til Danmarkar. Eitt nú er frádrátturin 519 krónur um dagin tá ið ferðast ímillum oyggjar til arbeiðis og hjá teimum, sum arbeiða uttanlands. Harumframt fáa teir ein frádrátt upp á 1,56 krónur fyri kilometur teir koyra eftir aftaná 24 kilometur.

– Hvat CN Bygg viðvíkur, førir hetta til minst 150 krónur afturat um dagin, afturat teimum 519 krónunum, tí vit koyra ikki minni enn 120 kilometur um dagin, sigur Reinhold Nielsen.

### Mest útjaðarin

Ein grundgeving fyri at lækka uttanlandsfrádráttin, er, at tað er stórt trot á handverkarar í Føroyum og endamálið er at royna at eggja handverkarum at koma heim at arbeiða.

Byggileiðarin í CN Bygg sigur, at tað er bara í Havn, at tað er trot á handverkarum.

– Men Føroyar eru annað enn Havnin og at kalla allir føroysku handverkararnir, sum arbeiða uttanlands, eru úr útjaðaranum í Føroyum.

Sjálvt hevur CN Bygg 25 mans í arbeiði í Danmark í løtuni. Eitt annað virkið úr Vági hevur nógv fleiri í arbeiði, og á Tvøroyri og í Hvalba eru fýra virki, sum hava handverkarar uttanlands.

Tilsamans hava feløgini í Suðuroynni einsamøll 90-100 føroyskar handverkarar uttanlands og tilsamans eru einir 300 føroyskir handverkarar uttanlands og arbeiða.

– Hetta eru fyri tað allarmesta handverkarar úr Suðuroy, Vágum, Klaksvík og av Skálafjørðinum.

– Sostatt hava teir lagt stór virði eftir seg í kommunukassar runt um í landinum.

Hann spyr tí eisini, hví ikki kommunupolitikarar ikki gera vart við seg, tí tað verða ikki minst kommunukassarnir í útjaðarunum, sum koma at merkja sviðan av at frádrátturin fer at lækka.

– Tað kann vera, at tað er trot á handverkarum í Havn, men tað er tað sanniliga ikki úti um landið.

Reinhold Nielsen sigur, at tað er eisini greitt, at teir handverkarar, sum ikki rýma av landinum, nú frádrátturin lækkar, fara so aldrin at flyta til Havnar.

– Hvar skulu teir búgva í Havn. Har er íbúðarneyðin so stór, at fyrst er tað ómøguligt at fáa tak yvir høvdið og hartil er tað ov dýrt.

– Sostatt er tað stórur fyrimunur í at flyta uttanlands. Og hjá teimum, sum kortini ikki gera tað, verður tað ALS, sum verður arbeiðsgevarin, sigur CN BYGG.

Hann leggur eisini dent á, at tað verður ómøguligt at útvega øllum føroyskum handverkarum uttanlands arbeiði í Føroyum.

Eitt vanligt ár er 1.600 arbeiðstímar. Hetta svarar til, at vit skulu útvega hvørjum handverkarar hálvtannað hús at smíða um árið og tað vita øll er ómøguligt,sigur Reinhold Nielsen.

